**Skjal A**

# Notat í sambandi við løgtingsmál nr. 5/2003

Við løgtingsmáli nr. 5/2003: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum skotið upp at seta eina heimild inn í § 8, ið loyvir, at "Veiðiloyvi kann verða flutt sambært ásetingunum í hesi grein, hóast fiskifarið er lagt med alla, er ella hevur verið ræðisavmarkað, ella farið er strikað í skipaskránni."

Uppskotið reisir tveir spurningar:

**1) Sum ásetingin er orðað, hevur hon ein dupultan týdning, hóast hetta ikki framgongur av viðmerkingunum. Mælt verður til at taka støðu til, um hesin dupulti týdningur er ætlaður.**

Sambært viðmerkingunum er endamálið, at fáa heimild at lata eigara flyta veiðiloyvi yvir á eitt fiskifar, sum er farið úr fiskiflotanum. T.v.s. at fiskifør, ið eru løgd med alla, eru ræðisavmarkað ella strikað í skipaskránni, skulu kunna koma inn aftur í veiðiflotan, um veiðiloyvi verður flutt teimum frá øðrum skipi við veiðiloyvi.

Ásetingin merkir tó eisini, at tað ikki ávirkar rættin til veiðiloyvi tá skip verða løgd med alla, verða ræðisavmarkað ella strikað í skipaskránni. Hesi veiðiloyvini verða sostatt verandi í gildi, og veiðiloyvi, ið gjøgnum árini eru farin úr gildi, tí at skip eru løgd med alla, ræðisavmarkað ella strikað í skipaskránni, verða sett í gildi aftur. Hetta merkir sostatt eisini, at ásetingarnar í § 8, stk. 4, 5 og 6, ið heimila, at tilsøgn kann gevast at flyta veiðiloyvi seinni, hereftir eru innihaldsleysar.

**2) Hin spurningurin er, um ásetingin ger treytirnar í stk. 1, 2 og 3 fyri at kunna flyta veiðiloyvi innihaldsleysar. Viðmerkingarnar til broytingaruppskotið viðgera spurningin, men geva einki svar. Mælt verður til, at støða verður tikin til, og greiðar viðmerkingar verða gjørdar til, hvat innihald treytirnar hava við nýggju ásetingini í § 8, stk. 8. Eru treytirnar innihaldsleysar, kann hetta merkja eina villleiðing av borgaranum, ið kann elva til fíggjarligan miss fyri viðkomandi.**

Bæði stk. 1, 2 og 3 seta sum treyt fyri at veiðiloyvi kann verða flutt til annað fiskifar, at fiskifarið, ið veiðiloyvi verður flutt frá, er lagt med alla, er ræðisavmarkað ella strikað í skipaskránni. Viðmerkingarnar, ið gjøgnum árini eru gjørdar til § 8, siga einki um endamálið við at seta hesar treytir, og við broytingaruppskotinum verður útilokað at nýta grundgevingina, at fiskifarið med alla skal úr føroyska fiskiflotanum.

Í viðmerkingunum til broytingaruppskotið verður sagt, at *"ein ræðisavmarking kann eisini merkja, at fiskifar við einum nýggjum loyvi, t.d. innan rækjufiskiskap ella til veiðu eftir uppsjóvarfiskasløgum, kann fáa meiri avmarkað rættindi, enn onnur fiskifør av líknandi slagi hava. Eitt annað sjónarmið hevur verið, at við tað, at ein ræðisavmarking er skrásett á skipsblaðnum hjá fiskifarinum, so gevur hetta størri gjøgnumskygni mótvegis borgaranum".* Hvat viðvíkur tí fyrstu grundgevingini, so hava ræðisavmarkingar til fiskifør við nýggjum loyvum einki at gera við ræðisavmarkingar á skip, ið hava mist loyvi. Hvat viðvíkur atlitinum at tryggja gjøgnumskygni mótvegis borgaranum, so verður gjøgnumskygni best tryggjað, um slík atlit verða tikin í skrásetingarlógini. Er trupulleikin sostatt, at skrásetingin ikki flytur fiskifør úr fiskifarskrásetingi yvir í stuttleikafarskrásetingina, tá tey hava mist veiðiloyvi, verður mælt til, at orðið "kann" verður broytt til "skal" í viðkomandi áseting í skrásetingarlógini, heldur enn at tryggja kunningina um, at

eitt far í fiskifarskrásetingini hevur mist veiðiloyvi, við at seta treytir um t.d. skrásetta ræðisavmarking í lógina um vinnuligan fiskiskap.

**Eitt dømi:** Per eigur 4 fiskiskip. Tað fyrsta, Anna, hevði veiðiloyvi, men sakk í 2000 og liggur framvegis á havsins botni. Tað næsta, Beinta, hevði eisini veiðiloyvi men var strikað í skrásetingini í 2001 og koyrt undir fremmant flagg. Tað triðja, Cecilia, er nýliga keypt úr Noregi, men var strikað úr føroysku skipaskránni í sambandi við, at veiðiloyvi var flutt á annað fiskifar í 1998. Tað fjórða, Durita, er ein nýbygningur, ið enn ikki er innfluttur og heldur ikki hevur fingið veiðiloyvi.

Hóast Cecilia varð eitt gott skip, seldi Hans skipið til Noregs í 1998 fyri lítið og lætt, tá hann flutti veiðiloyvi av Ceciliu og yvir á nýbygningin Elsu. Hetta tí at lógin setir sum treyt fyri at flyta veiðiloyvi, at Cecilia antin varð løgd med alla, ræðisavmarkað ella strikað úr skipaskránni.

Sum lógin verður umsitin í dag, er tað ivasamt, um veiðiloyvini kunnu verða flutt av Annu ella Beintu. Tað er eisini ivasamt, um veiðiloyvi frá øðrum fiskifari kann verða flutt á Ceciliu. Galdandi lóg heimilar tó heilt greitt, at veiðiloyvi frá øðrum fiskifari kann verða flutt á Duritu.

Við broyttu lógini er eingin ivi um, at veiðiloyvini kunnu verða flutt av Annu og Beintu. Tað er heldur eingin ivi um, at veiðiloyvi kann verða flutt av Annu, Beintu ella øðrum fiskifari við veiðiloyvi á Ceciliu. Sambært viðmerkingunum er tað tó bert ætlanin at loyva Ceciliu at koma innaftur í veiðiflotan. Uppskotna lógarbroytingin inniber onga broyting í heimildini at flyta veiðiloyvi frá øðrum fiskifari á Duritu.

Kristina Samuelsen, løgfrøðingur
22. oktober 2003

§ 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap, hevur undan broytingini, soljóðandi orðing:

**§ 8.** Veiðiloyvi frá fiskifari, ið er lagt med alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella farið er strikað í skipaskránni, kann eftir umsókn verða flutt til annað fiskifar uttan veiðiloyvi við somu ella minni fiskiorku ella til innflutt fiskifar við somu ella minni fiskiorku. Er talan um veiðiloyvi til uppsjóvar fiskasløg, rækjuveiði ella til fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar, kann landsstýrismaðurin gera undantak frá hesum kravi.
*Stk. 2.* Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt med alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni, ella farið verður strikað í skipaskránni, kann landsstýrismaðurin eftir umsókn veita eigaranum tilsøgn um, at veiðuloyvið kann verða flutt til annað fiskifar við veiðuloyvi. Tó er ikki loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 15 tons, til fiskifar størri enn 15 tons ella øvugt. Landsstýrismanninum verður heimilað at lata eigaranum av fiskifarinum, sum veiðuloyvið verður flutt á, at njóta rættindi svarandi til, at fiskiorkan ikki verður størri enn fiskiorkan tilsamans hjá fiskifarinum framman undan og fiskifarinum, sum veiðuloyvi verður flutt frá.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita eigarunum tilsøgn um, at veiðiloyvi frá tveimum fiskiførum, ið eru løgd med alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella førini eru strikað í skipaskránni, kunnu verða flutt til annað fiskifar uttan veiðiloyvi ella til innflutt fiskifar. Tó er ikki loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 15 tons, til fiskifar størri enn 15 tons ella øvugt. Landsstýrismanninum verður heimilað at lata eigaranum av fiskifarinum, sum veiðuloyvini verða flutt á, at njóta rættindi svarandi til, at fiskiorkan ikki verður størri enn fiskiorkan tilsamans hjá fiskiførunum, sum veiðuloyvini verða flutt frá.
*Stk. 4.* Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt med alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni, ella farið verður strikað í skipaskránni, kann landsstýrismaðurin eftir umsókn veita eigaranum tilsøgn um veiðuloyvi til annað fiskifar ístaðin, sum skal verða skrásett í skipaskránni innan 2 ár frá tí degi, at tilsøgnin er givin. Fiskifarið, sum kemur ístaðin, skal lúka treytirnar í stk. 1 viðvíkjandi fiskiorku. Hevur persónur ella felag ikki gjørt nýtslu av einari sambært 1. punktum givnari tilsøgn, kann landsstýrismaðurin, tá fiskiár byrjar, tilluta bólkinum fiskirættindini.
*Stk. 5.* Landsstýrismanninum verður givin heimild til í serligum førum at víkja frá 2 ára tíðarfreistini sum ásett í stk. 4.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita persóni ella felag við tilsøgn um veiðuloyvi sambært stk. 4 tilsøgn um, at veiðuloyvið kann verða flutt til annað fiskifar samsvarandi stk. 2 og 3.
*Stk. 7.* Fiskiorkan verður m.a. útroknað eftir miðalveiðutølum fyri hvønn brúktan fiskidag í hvørjum bólki sær, nevndir í §§ 28 og 29. Trolbátar í bólki 4 verða viðgjørdir fyri seg. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út, og um mannagongd fyri samanlegging og umsiting sambært reglunum í stk. 1 - 5.
*Stk. 8.* Ásetingarnar í stk. 1-7 eru eisini galdandi fyri flyting av fiskiloyvi millum fiskifør í bólki 5 sambært § 28, stk. 1.